# Miðnámsrit

12 **januar 2017**

## Um blaðið

Próvtøkur á miðnámi eru ikki eftirfarandi. Tað er niðurstøðan í kanning, ið byggir á samrøður við lærarar á miðnámi. Olav Absalonsen hevur skrivað grein um hetta, sum er ein av 5 greinum í tólvta Miðnámsriti.

Heilsuskúli Føroya byrjaði 2001. Frammanundan høvdu skeið verið fyri heimahjálparar og heilsuhjálparar, sum framskygdar kvinnur høvdu tikið stig til. Jórun Petersen hevur skrivað søguna um skúlan, har hon vísir á ta stóru nyttu, hesin skúli hevur fyri samfelagið.

Dorthe Pedersen og Kinna Poulsen hava skrivað um lærugreinina danskt, sum eftir reformin í 2013 ikki longur er kravd á gymnasialum miðnámi. Samstundis sum danskt varð tikið burtur sum kravd lærugrein, skuldi føroyskt styrkjast, men tað hendi ikki.

Fyri fyrstu ferð síðani 1997 hevur miðnámslærari í aðrari lærugrein enn føroyskum tikið bæði ástøðiliga og verkliga partin av námsfrøðiligu útbúgvingini í Føroyum. Jón í Haraldsstovu, ið tók verkliga partin í 2016, greiðir í viðtali frá hesum framstigi, at aftur ber til at taka verkliga partin í Føroyum.

Ein av oddamonnunum at útrudda sokallaða “svarta skúlan” í Danmark síðst í sjeytiárunum var Sten Clod Poulsen, sum mælti til at sleppa allari uttanatlæru og leggja dent á tvørfakliga læring. Hetta hevur havt við sær, at næmingar hava lopið fakligheit og uttanatlæru um. Nú biðja Sten Clod Poulsen og aðrir um umbering. Tórður Johannesarson hevur leysliga týtt grein, ið stóð í Politiken í 2010.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

**Hví próvtøkur ikki eru eftirfarandi, Olav Absalonsen** 3

**Tær bygdu land – søgan um Heilsuskúlan, Jórun Petersen** 10

**Danskt á miðnámi átti at fingið hægri raðfesting, Dorthe Pedersen og Kinna Poulsen** 15

**Námsfrøðiliga útbúgvingin skal vera í Føroyum – viðtal við Jón í Haraldsstovu, Tórður Johannesarson** 17

**Vit fóru skeiv – hví terping og uttanatlæra kortini hevur týdning, Sten Clod Poulsen, Tórður Johannesarson týddi** 19

# Hví próvtøkur ikki eru eftirfarandi

Olav Absalonsen

**Samrøður við lærarar, ið umboða øll fakøki á Føroya Handilsskúla, og sum hava drúgvar royndir í undirvísing og í próvtøkudøming, avdúka, at próvtøkur ikki eru eftirfarandi. Próvtøkuskipanin er viðbrekin, siga teir.**

Skrivligar próvtøkur eru meira eftirfarandi enn munnligar, og sum heild er stórur ivi um, hvørt próvtøkur eru so eftirfarandi og álítandi, sum tær áttu at verið. Tað er høvuðsniðurstøðan í samrøðukanning, sum varð gjørd við lærarar á Handilsskúlanum í 2008. Álitið á próvdømingina er eisini avgerandi fyri eina útbúgvingarskipan, men tá ið lærarar sjálvir viðganga, at próvdømingin ofta er tilvildarlig, kann tað hava álvarsligar avleiðingar fyri tað álitið. Næmingar hava harafturat krav uppá, at metini eru so neyv endurspegling av avrikinum, sum gjørligt. Próvtøkuskipanin má í minsta lagi verða endurskoðað, ella endurskapað, um hesi krøv skulu lúkast.

Ein próvtøka eigur at vera vísindalig: Hon skal eftir ásettum krøvum og reglum gera av, hvørjar førleikar næmingurin hevur eftir ávísum standardi, sum er settur frammanundan. Men skal próvtøkan vera vísindalig, má hon vera eftirfarandi[1] og álítandi[2], sum allar vísindaligar kanningar skulu vera. Krøvini til próvtøkur kunnu verða býtt í trý:

1. Próvtøkuspurningarnir umboða tey ásettu læringsmálini.
2. Avrikið hjá næminginum er ein ábending um, hvørjar førleikar næmingurin hevur.
3. Próvdømingin er álítandi.

## Próvtøkuspurningarnir

Próvtøkuspurningarnir eru avgerandi fyri, um próvtøkan skal vera eftirfarandi. Munnligar próvtøkur eru ofta skipaðar soleiðis, at næmingurin tekur ein spurning í einum øki í fakinum. Lærarar, sum eg havi tosað við, halda, at henda skipan manglar validitet – uttan í fremmandamáli, har metingin av at duga at samskifta munnliga er ein partur av heildini. Her eru nakrar endurgevingar av tí, sum lærarar søgdu:

- Munnligar próvtøkur eru ikki umboðandi
- Munnligar próvtøkur umboða bara ein part
- Um munnligar próvtøkur eru eftirfarandi? Tað er sum at spæla í happadrátti

[1] Eftirfarandi merkir her, at próvtøkan skal kanna tað, sum hon eigur at kanna: hon skal hava validitet
[2] Álítandi merkir her, at dømingin er eins og støðuføst: hon skal hava reliabilitet

- Munnligar próvtøkur eru reint eydnuspæl
- Næmingar hopa, at teir ikki fáa spurning í onkrum ávísum evni, tí so fer tað ikki at ganga væl

Sum heild halda lærarar, at skrivligir próvtøkuspurningar eru meira eftirfarandi. Í onkrum skrivligum próvtøkum kunnu næmingarnir velja ímillum fleiri evni, og tí kunnu teir velja eitt evni, sum teir kenna seg sterkar í. Tí eru skrivligar próvtøkur heldur ikki altíð umboðandi. Næmingar skulu viðhvørt sita í 5 tímar til skrivliga próvtøku, og er tað so mikið leingi, at hesar próvtøkur testa ikki bara tað, sum tær skulu, men eisini hvussu sterkur og treystur næmingurin er, og tað skaðar validitetin. Her eru nakrar endurgevingar frá samrøðum við lærarar:

- Í munnligum próvtøkum kemur vitanin hjá næmingunum væl fram í einum parti av førleikakrøvunum, men í tí skrivligu próvtøkuni kemur vitanin hjá teimum heldur verri fram í einum størri parti
- Skrivligar próvtøkur hava størri grundarlag enn munnligar
- Um teir próvtøkuspurningarnir, sum verða gjørdir uttanhýsis, svara til námsætlanina, er próvtøkan eftirfarandi, men tíverri er tað ikki altíð so
- Í tí skrivligu próvtøkuni kunnu næmingarnir velja ímillum 5 evni, og teir kunnu velja í tráð við, hvat teir eru sterkir í
- Um skrivligar próvtøkur eru meira eftirfarandi, veldst um evni, men samanumtikið eru tær meira eftirfarandi enn munnligar

Ein annar munur ímillum skrivligar og munnligar próvtøkuspurningar er, at uppgávunevndir undir Mentamálaráðnum gera skrivligar próvtøkuuppgávur, og lærarar sleppa ikki at síggja hesar uppgávur, fyrr enn próvtøkan hevur verið, men í munnligum próvtøkum ger lærarin próvtøkuspurningarnar, sum skulu góðkennast av uttanhýsis próvdómara. Her skal leggjast afturat, at einstakir lærarar eru limir í uppgávunevndum undir Mentamálaráðnum.

## Avrikið

Avrikið hjá næminginum er ábyrgdin hjá næminginum, men avrik kunnu vera ójøvn. Próvtøkustøðan er ónatúrlig, og hon ávirkar fólk og avrik ymiskt, sum víst er á í grein í Miðnámsriti nr. 10, har ein niðurstøða er, at flestu dreingir klára seg lutfalsliga betur til próvtøkur enn flestu gentur. Sjálvt um næmingurin hevur ábyrgdina at gera sítt besta, eru aðrir faktorar við próvtøkuni, sum hann ella hon ikki ræður yvir.

Ein kanning á Føroya Handilsskúla í 2007 gevur ábendingar um, at tá ið próvtøkan er skrivlig, eru ársmetini ofta hægri enn próvtøkumetini, men tað er við tí fyrivarni, at hetta ikki er líka fyri allar lærugreinir. Tveir av lærarunum, sum eg havi havt samrøðu við, vísa

á, at summir næmingar hava ikki so góðar førleikar at skriva, og tá ið ársmetið er grundað á fleiri metingarhættir, meðan próvtøkan er nógv treytað av førleika at skriva, er vantandi førleiki at skriva ein forðing fyri summi at vísa, hvat tey eru før fyri.

Tær munnligu próvtøkurnar á miðnámi eru í flestu førum fullkomiliga munnligar, og tað munnliga er sostatt avgerandi fyri avrikið, og næmingurin, sum ikki megnar skrivligar próvtøkur so væl, kann klára seg nógv betur í munnligum próvtøkum. Munnligar próvtøkur kunnu hava ein fyrimun í samskiftinum, sum er millum næmingin og próvdómarar.

Hvussu nógv næmingar snýta til próvtøkur vita vit ikki fyri vist, tí vit kenna bara til tað, sum verður avdúkað, men orsøk er til at halda, at tað, sum ikki verður avdúkað, er nógvar ferðir tað, sum verður avdúkað, tí tá ið næmingur verður tikin í at snýta, er tað vanliga, tí hann hevur dugað sera illa at fjala tað. Her átti próvtøkuskipanin at lagt upp fyri, at tað skal ikki vera lætt at snýta.

## Dømingin

Tá ið samrøðurnar við lærararnar vórðu gjørdar í 2008, vóru reglurnar soleiðis í flestu lærugreinum, at ein uttanhýsis próvdómari dømdi saman við læraranum í bæði skrivligum og munnligum próvtøkum. Lærararnir vórðu spurdir um uttanhýsis próvdómararnar, og her eru brot úr tí, sum teir svaraðu:

- Summir eru betri enn aðrir. Teir lúka ikki altíð krøvini hjá Mentamálaráðnum. Teir eru ógvuliga ymiskir
- Tá ið vit hava próvdómarar frá vinnulívinum, kunnu teir seta ov stór krøv til næmingarnar; men oftari seta teir ov lítil krøv, og tá hava teir hug at geva ov høgar karakterir
- Viðhvørt hava vit sama uttanhýsis próvdómara í fleiri próvtøkum í sama próvtøkuskeiði; tað er ein gøla
- Meira ofta enn ikki er Mentamálaráðið ikki ført fyri at halda egnar reglur (um førleikakrøv til próvdøming)
- Sum heild eru teir væl skikkaðir, men undantøk eru: viðhvørt tykjast teir at líða av undirlutakenslum
- Ikki allir eru egnaðir, teir eru sum blandað bomm

Eftir hesum útsøgnum at døma manglar støðufesti í dømingini, og ábyrgdin at seta væl skikkaðar próvdómarar er hjá Mentamálaráðnum. Her skal sigast, at Mentamálaráðið hevur síðani 2010 skipað fyri próvdómarafundum í sambandi við allar skrivligar próvtøkur á gymnasialum miðnámi, áðrenn avrikini eru endaliga dømd, og er hetta helst við til at bøta um støðufestið, soleiðis at tað verður ein meira felags linja í dømingini, enn tað var frammanundan.

Eins og við próvtøkuspurningum og uppgávum er munur á dømingini í skrivligum og munnligum próvtøkum. Í skrivligum próvtøkum døma nú tveir uttanhýsis próvdómarar, men í munnligum próvtøkum er ein uttanhýsis próvdómari, og hin próvdómarin er lærarin hjá næminginum.

## Kjak

Tey trý krøvini til eina kanning vóru: próvtøkuspurningarnir (innanhýsis validitetur); avrikið hjá næminginum (uttanhýsis validitetur); og dømingin (hvussu álítandi hon er). Tað er lætt at síggja, at henda skipanin er viðbrekin. Sjálvt um næmingurin ger sítt besta, eru meinbogar á vegnum frá próvtøkuspurningum umvegis avrik til avgerðina um met.

Bæði lærarar og næmingar uppliva skipanina við at taka ein spurning til próvtøkuna sum eitt slag av happadrátti. Harumframt føra lærarar fram, at munnligar próvtøkur eru ikki eftirfarandi, tí næmingar kunnu taka 'góðar' spurningar, og summar skrivligar próvtøkur eru heldur ikki eftirfarandi, tí næmingar kunnu velja ímillum nógvar spurningar; hetta er ein annar happadráttur. Tann triði happadrátturin í sambandi við próvtøkur er, at próvdómararnir, sum koma uttaneftir, ikki døma eins.

Vit kunnu ímynda okkum, at næmingur sleppur til próvtøku í faki, har hann hevur góðan møguleika at fáa betri próvtøkumet enn ársmet. Harumframt fær hann ein hepnan spurning til próvtøkuna, soleiðis at avrikið verður enn betri, enn væntað. So kann hann eisini hava hepni við sær, at próvdómarin er ein, sum gevur hægri met enn aðrir. Alt kann eisini fara hinvegin. Tann námsfrøðiliga leiðslan, sum tekur avgerðir um hesi viðurskifti, er Mentamálaráðið, ið er á makro stigi, men tey, sum eygleiða hesar veikleikarnar, eru lærarar á mikro stigi. Tí eru skúlaleiðslurnar á meso stigi, sum liggur ímillum makro og mikro, í eini lyklastøðu at taka stig til at broyta verandi skipan.

At summativ meting í verki er ein fløkja, er ikki serføroyskt. Peter T. Knight vil vera við, at tað er ikki bara metingarteknikkurin, sum skinklar, men at sjálv endamálini við metingini eru fløkt saman, soleiðis at dømingin verður líkasæl og óstøðug, sum er óetiskt. Fyri at broyta fatanina um hetta setir hann hesar spurningar[3]:

- Hvat hava vit summativa meting til?
- Hvønn er hon fyri?
- Hvat kann hon gera?
- Hvat kann hon ikki gera bíliga?

---

[3] KNIGHT, P., 2002. Summative Assessment in Higher Education: practices in disarray, Studies in Higher Education, Vol. 27, No. 3, pp. 275-286.

- Hvat átti ikki at verið kravt av henni?

Hesir spurningar eru so rúmir, at teir eru viðkomandi á øllum leiðslustigum, har avgerðir verða tiknar um útbúgving í verki: Broytingar, sum skulu fremjast á mikro-stigi, mugu stuðlast við einum metingarpolitikki á meso-stigi í útbúgvingarstovninum, og við yvirskipaðum metingarpolitikki á makro stigi. Vit kunnu eisini venda tí hinvegin: um avgerðir tiknar á makro stigi skulu virka, er neyðugt, at leiðarar á meso og mikro stigi verða involveraðir.

Eitt endamál við summativari meting er at skriva prógv ella váttanir, sum uttanhýsis brúkarar, ið til dømis eru arbeiðspláss og útbúgvingarstovnar, taka avgerðir út frá, tá ið teir skulu seta fólk í starv ella taka næmingar inn. Slík skjøl kunnu verða samanborin við ársfrásagnir hjá partafeløgum, sum eru gjørdar til uttanhýsis brúkarar, ið eru íleggjarar og kreditorar, og sum taka avgerðir út frá hesum frásagnum. Vinnulívið hevur reglur og standardar at brúka á hesum øki. Á sama hátt tørvar okkum á miðnámi nøkur amboð til summativa meting í verki, so vit gerast meira tilvitað um, hví hon verður gjørd, hvat hon skal brúkast til, og hvørjum hon er ætlað.

Nógv kann verða gjørt fyri at próvtøkurnar verða meira eftirfarandi og álítandi. Fyri at minka um snýt við próvtøku kundu vit havt stuttar afturlatnar próvtøkur við ongum hjálparamboðum, sum longu verður gjørt í onkrum lærugreinum í dag. Hesar próvtøkur kunnu vera stuttar, og tær eru væl egnaðar at finna út av, hvat næmingurin dugir. Próvtøkur skulu heldur ikki vera so drúgvar, at tað ger validitetin verri. Fyri at minka um snýt í verkætlanum er eitt hugskot, at næmingurin skal verja skrivliga arbeiðið munnliga. Hetta verður sjálvsagt dýrari, men bíligar loysnir eru ikki altíð tær skilabestu.

Við reforminum, sum varð gjørdur innan gymansialt miðnám í 2013, og við tillagingunum innan aðrar miðnámsútbúgvingar, sum vórðu gjørdar um somu tíð, er ikki nakað broytt, sum ger próvtøkur meira eftirfarandi ella álítandi. Skrivligar próvtøkuuppgávur verða framvegis gjørdar av uppgávunevndum, sum ikku mugu lata nakað leka út til lærararnar, tó at summir lærarar eru í uppgávunevndini. Tað kundi økt munandi um dygdina, um próvtøkuuppgávurnar vórðu sendar øllum lærarum til ummælis, áðrenn tær vórðu endaliga samtyktar.

Munnligir próvtøkuspurningar verða framvegis gjørdir av læraranum, sum skal føra næmingarnar upp. At hesir spurningarnir verða sendir til ummælis hjá uttanhýsis próvdómara, er eitt eftirlit, ið skal halda onkra dygd í spurningunum, tó at tað er ivasamt, hvussu trygt hetta eftirlitið er. Tá ið verandi skipan letur arbeiðið at gera munnligar próvtøkuspurningar upp í hendurnar á viðkomandi lærara, er tað enn meira óskiljandi, at lærarar ikki fáa tær skrivligu próvtøkuuppgávurnar til ummælis. Eisini er tað órímiligt, at

uttanhýsis próvdómarar í skrivligum próvtøkum, ikki fáa loyvi at síggja próvtøku-uppgávurnar, áðrenn teir játta at verða próvdómarar. Dømi eru um, at teir kenna seg førdar út í óføri, tí próvtøkuuppgávurnar eru so illa frágingnar, at tað er mestsum ómøguligt at døma.

Tey trý krøvini fyri, at ein próvtøka skal vera eftirfarandi og álítandi, eru sum ein keta, og ketan er ikki sterkari enn veikasta liðið. Eru próvtøkuspurningar ógreiðir, er trupult at tosa um gott ella vánaligt avrik, tí næmingurin hevur kanska ikki skilt spurningin. Her kemur tað afturat, at próvtøkustøðan er spent og ónatúrlig, og lítið skal til at ørkymla næmingar – summar meira enn aðrar – og tað kann ganga út yvir alt avrikið tann dagin. Í slíkum umstøðum er trupult at gera eina álítandi døming, tí ketan er longu slitnað. Tíverri hava myndugleikarnir viðhvørt ilt við at viðurkenna brek í skrivligum próvtøkuuppgávum og bjóða næmingunum endurpróvtøku, tí teir eru helst bangnir fyri, at tað skal leka út. Nógv av hesum kundi verið fyribyrgt, um lærarar og uttanhýsis próvdómarar fingu próvtøkuuppgávurnar til ummælis, áðrenn tær fara út.

Til at styrkja sjálva dømingina er eitt hugskot, at uttanhýsis próvdómarar eru limir í einum føstum próvdómarahópi á einum skúla. Tá ið teir hava játtað at verða limir í hesum hópi, kunnu teir rokna við at verða bidnir at vera próvdómarar. Skúlin sjálvur ella Mentamálaráðið skuldi so havt til uppgávu at røktað próvdómarahópin soleiðis, at hann er kunnaður um allar broytingar, sum verða gjørdar í reglunum. Av og á kundu teir verið bodnir til fyrilestrar ella skeið í próvtøkudøming.

## Viðmerkingar at enda

Próvtøkur á miðnámi eru ikki nóg eftirfarandi og álítandi, tá ið vit hugsa um, hvat prógvini skulu brúkast til. Próvtøkur eiga ikki at bera brá av happadrátti. Tær reint munnligu próvtøkurnar skuldu verið tiknar av, og munnligar próvtøkur kundu verið ein partur av eini størri heild, til dømis at næmingurin verjir eitt skrivligt avrik munnliga. Tað kundi eisini minkað um snýt við próvtøkuverkætlanum, tí sum nú er, verður eitt nú breytarverkætlanin bara latin inn og dømd. Ein munnlig verja kundi avdúkað, um næmingurin sjálvur hevur skrivað uppgávuna.

Próvtøkuskipanin eigur ikki at bjóða inn til, at næmingarnir snýta. Skrivligar próvtøkur við øllum hjálparamboðum freista til snýt. Tí áttu vit bara at havt skrivligar próvtøkur, har eingi hjálparamboð eru loyvd; hesar próvtøkur, sum kunnu vera stuttar, skuldu so talt ein ávísan part av endaliga metinum. Arbeiði, har næmingarnir kortini kunnu nýta øll hjálparamboð, kunnu vera gjørd heima. Tíðin er farin frá at seta næmingar inn í eitt høli við vaktarhaldi, tá ið teir kortini kunnu samskifta við umheimin.

Fyri at bøta um validitetin við skrivligum próvtøkum skuldu próvtøkuuppgávurnar verið gjørdar lokalt á hvørjum skúla – við góðkenning av umboðum frá Mentamálaráðnum, ella skuldu tær verið gjørdar sum nú í Mentamálaráðnum, men so mugu lærarar og uttanhýsis próvdómarar fáa uppgávurnar til ummælis, áðrenn tær verða brúktar. Tað er betri, at kritikkurin kemur, áðrenn skaðin hendir.

Til at gera dømingina meira álítandi skuldu próvdómarar fingið vegleiðing í at døma. Tað er ikki nóg mikið at hava fakligar førleikar. Onkrar formligar reglur eru, men próvdómarahópurin má styrkjast, soleiðis at vit fáa meiri støðufesti í dømingina.

# Tær bygdu land – søgan um Heilsuskúlan

Jórun Petersen

**Við útbúgving av umleið 60 fakfólkum árliga síðani 2001 er almanna- og heilsuøkið ment og styrkt nógv fakliga tey 15 árini, ið heilsuútbúgvingarnar hava verið í Føroyum. Tað vóru framskygdar og vísar kvinnur, sum í 1974 kravdu at fáa útbúgving innan hetta arbeiðsøkið.**

Heilsuskúli Føroya er stovnaður í 2001 og byrjaði á Tvøroyri í mai mánað hetta árið. Fyrstu næmingarnir vóru heimahjálparar, ið tóku uppskúlingsútbúgving, ið var styttri enn vanlig útbúgving, tí at næmingarnir høvdu viðkomandi arbeiðsroyndir innan fyri røkt. Sama árið í september byrjaði fulla útbúgvingin, har kravið var lokið 10. floks prógv. Tað er ilt at siga nakað um søguna og forsøguna hjá Heilsuskúla Føroya uttan at nevna Heilsuhjálparafelagið, ið er fakfelagið hjá heimahjálparum í Føroyum.

## Forsøga

Sambært bókini *Hendur ið fjálga*, sum Ása Olsen hevur skrivað, og Heilsuhjálparafelag Føroya hevur givið út, vóru tað Havnar Kvinnufelag og Kvinnusamskipanin, sum arbeiddu fyri at fáa eina heimahjálparaskipan í lag í Føroyum, og sum ivaleyst hava sæð tørvin á einari slíkari skipan. Heimahjálparaskipan varð lógarásett í Føroyum í 1973 og var ein av sosialu ábótunum í føroyska samfelagnum, og harvið spratt tørvur á útbúgving eisini.

At byrja við vóru høvuðsuppgávurnar hjá heimahjálparunum at rudda, gera reint, ganga ørindi (um tað var neyðugt), bøta klæði, ansa børnum og hjálpa til við persónligum reinføri og matgerð. Uppgávurnar kundu vera at sita inni hjá eldri fólki, tí at tey avvarðandi vóru til arbeiðis. Um heystið kom mangan fyri, at heimahjálpin tók slakt ella epli upp fyri borgarar. Tað var ikki óvanligt at taka klæðir hjá borgarum heim við at vaska og bøta, at geva heimalambinum, at skifta dysu á oljufýringini ella at mála fyri tey. Tað kom fyri, at ein heimahjálp var inni hjá einum borgara í 8 tímar um dagin. Mangan vóru arbeiðsumstøðurnar tungar og torførar, og hjálparamboð sum vóru eingi. Arbeiðið var ofta einsligt og sjálvstøðugt.

## Heimahjálparaútbúgving

Innan heimahjálparaskipanina hevur tørvurin á skeiðum og útbúgving øll árini verið sæddur og mettur at vera umráðandi. Longu í 1974 kom møguleiki at taka skeið fyri heimahjálparar í Føroyum. Fólk frá Socialministeriet í Danmark skipaðu fyri. Lærugreinir,

ið tá vóru á skránni vóru: sálarlæra, sjúkrarøkt, matlæra, fyrstahjálp, arbeiðs- og flytihættir, samfelagslæra og sosiallæra, ja enntá oljufýring var á tímatalvuni. Hesi skeið vóru hildin fram til 1996, tá ásannað var, at brúk varð fyri aðrari útbúgving.

So líðandi broyttust uppgávurnar frá húsligum uppgávum til at umfata persónliga røkt og umsorgan. Starvsfólkini fingu størri ábyrgd og vóru í størri mun við til at taka avgerð um, hvussu hjálpin skuldi raðfestast og harvið tryggja, at teir mest røktarkrevjandi borgararnir fingu hjálp. Heimahjálparanir fingu egið fakfelag í 1979, og felagið hevði stóran leiklut í arbeiðinum, ið var gjørt fyri at fáa heilsuútbúgvingar settar á stovn í Føroyum.

## Heilsuhjálparaútbúgving verður sett á stovn

Tá heimahjálparaskeiðini vórðu avtikin í 1996, varð skjótt greitt, at um fakbólkurin skuldi hava nakrar møguleikar at klára nýggju avbjóðingarnar, varð neyðugt at fáa nýggja heilsuútbúgving í Føroyum. Heimahjálparafelag Føroya byrjaði eitt miðvíst og drúgt arbeiði fyri at røkka hesum máli og gjørdi politiska myndugleikan varugan við tørvin á útbúgving. Ein nevnd varð at enda sett at gera uppskot um lóg um heilsuútbúgvingar á miðnámsstigi.

Í 2000 varð gjørt av, at Heilsuskúli Føroya skuldi vera á Tvøroyri. Útbúgvingin var mest sum tann sama, ið tá var í Danmark. Hetta valið tóku myndugleikarnir fyri at tryggja, at útbúgvingin kundi sammetast við onnur lond, og fyri at kunna nýta útbúgvingina aðrastaðni, bæði í arbeiði og til víðari útbúgving.

Tann 5. mai 2001 byrjaði skúlavirksemi í Heilsuskúla Føroya á Tvøroyri. Sett vórðu trý starvsfólk, tveir undirvísarar við niðursettari tíð og ein deildarleiðari við undirvísingarskyldu.

Fyrireikingar vóru mánaðirnar frammanundan, har skúlin søkti sær fakliga ráðgeving frá Sosu-skúlanum á Bornholm. Tveir uppskúlingsflokkar frá heimahjálp til heilsuhjálpara vórðu tiknir inn um árið, og teir byrjaðu í apríl og november mánað hvørt ár fram til 2006. Uppskúlingsnæmingar vóru fólk, ið vóru í føstum starvi innan heimatænastuna. Upptøkukrøv til uppskúlingsútbúgvingina vóru arbeiðsroyndir innan heilsu- og røktaryrkið, í minsta lagi 24 tímar um vikuna í 3 ár tey seinastu 5 árini. Fulla útbúgvingin vardi 12 mánaðir, og har vóru tveir skúlapartar og tveir starvsvenjingarpartar. Arbeiðsroyndirnar góvu rætt til at taka stytta útbúgving, ið vardi ½ ár og var uppbygd við einum skúlaparti og einum starvsvenjingarparti.

Ein flokkur av heilsuhjálparum, ið tók fulla útbúgving, byrjaði í september á hvørjum ári frá 2001 fram til 2006. Tey fyrstu 5 árini vóru tríggir flokkar í gongd árliga. Umleið 60 næmingar fingu tá prógv um árið. Heilsuskúlin var fyrstu árini ein undirdeild av

Sjúkrasystraskúla Føroya í Tórshavn. Eitt útbúgvingarráð var at ummæla broytingar í útbúgvingunum.

Fyrstu árini helt skúlin til í gamla skúlahúsinum við Tvøroyrar skúla, har var ein skúlastova, eitt uppihaldsrúm og tvær skrivstovur.

Tørvurin á meira plássi øktist so hvørt, sum fleiri flokkar komu til, og eitt tíðarskeið var Musikkstovan leigað frá Tvøroyrar skúla. Tá tann møguleikin ikki var longur, varð farið út í býin at leiga høli. Hetta bar ikki til í longdini og var helst orsøkin til, at ætlanir um nýggjan skúla komu í lag.

## Stór førleikamenning

Í 2006 høvdu flestu heimahjálparar, ið luku krøvini um uppskúling, fingið útbúgving. Sambært tølum frá Heilsuskúlanum vóru 160 heimahjálparar uppskúlaðir til heilsuhjálpara tey fyrstu 5 árini. Hetta er helst størsta førleikamenningin í Føroyum higartil av einum so stórum starvsfólkabólki í so stutta tíð.

Eftir 2006 var uppskúling frá heimahjálpara til heilsuhjálpara ikki longur møgulig. Møguleikin at fáa meritt fyri arbeiðsroyndir var tó skrivaður inn í kunngerðina fyri útbúgvingarnar. Harumframt tóku nakrir psykiatriskir pleygarar í 2010 uppskúlingsútbúgving til heilsurøktara.

## Heilsurøktaraútbúgvingin verður sett á stovn

Í apríl 2006 byrjaði heilsurøktaraútbúgvingin í Føroyum, og er hon 22 mánaðir long. Heilsuhjálparaútbúgvingin bleiv broytt, og tveir flokkar av heilsuhjálparum og ein flokkur av heilsurøktarum vóru frá 2006 árliga upptiknir á Heilsuskúlan.

Útbúgvingin til heilsuhjálpara bleiv longd frá 12 mánaðum til 15 mánaðir, og almennar lærugreinir sum føroyskt, danskt, enskt og náttúrulæra vórðu lagdar inn í útbúgvingarnar, eins og gjørt varð í donskum útbúgvingum. Í Føroyum bleiv útbúgvingin tó tveir mánaðir longri, tí at føroyskt bleiv lagt afturat sum tann fjórða almenna lærugreinin.

Almennar lærugreinir blivu lagdar inn í útbúgvingarnar fyri at betra um almenna vitan, og tí at skrivlig skjalfesting er eitt krav til fakbólkin. Ein orsøk var eisini at geva næmingunum møguleika at útbúgva seg víðari.

Heilsuútbúgvingarnar á Heilsuskúlanum blivu við broytingunum at rokna sum yrkisførleikagevandi miðnámsútbúgvingar, ið geva atgongd til víðari útbúgving, og tað var eitt stórt framstig á útbúgvingarliga økinum.

## Førleikin í útbúgvingunum

Ofta verður hildið, at tað er ilt at kenna munin á báðum útbúgvingunum. Heilsuhjálparaútbúgvingin gevur førleikar at veita umsorgan og røkt, og heilsurøktarin veitir sjúkrarøkt. Heilsuhjálparar kunnu eftir lokna útbúgving arbeiða á ellisheimum og í sambýlum og hava uppgávur inni í privatum heimum at stuðla, tá evnini hjá borgarum svíkja. Yrkislærugreinirnar eru: røkt, endurmenning, sálarfrøði, almanna- og samfelagslæra og arbeiðsumhvørvi.

Heilsurøktaraútbúgvingin er framhald av heilsuhjálparaútbúgvingini og gevur førleikar at veita sjúkrarøkt, heilsurøkt og fyribyrgjandi arbeiði. Heilsurøktarin kann arbeiða á sjúkrahúsum og innan psykiatriska økið, á ellisheimum og í privatum heimum.

Yrkislærugreinirnar eru: sjúkrarøkt, somatisk og psykiatrisk sjúkralæra, heilivágslæra, endurmenning og almenna- og samfelagslæra.

Báðir fakbólkarnir veita hjálp til sjálvhjálp og skulu umhugsa ikki at yvirtaka tað, ið borgarin kann, og soleiðis verður arbeitt við at vinna aftur mistar førleikar. Sjálvsavgerðarrætturin hjá borgarunum verður settur í hásæti soleiðis, at borgarin hevur ávirkan á egið lív og virki.

## Nýggjar tíðir við menning og broytingum

Í 2009 flutti Heilsuskúlin í nýggj høli í Skúladeplinum í Suðuroy, har tveir skúlar skulu húsast saman: Miðnámsskúlin í Suðuroy og Heilsuskúli Føroya. Hetta var ein stórbroyting í hølisviðurskiftunum. Ígjøgnum árini hevur Heilsuskúlin húsast nógva ymiska staðni, og eitt tíðarskeið í 2014 helt skúlin til í fólkaskúlanum í Vági, meðan umvælingar vórðu gjørdar í núverandi hølum á Skúladeplinum.

Broytingar verða gjørdar í fyrisitingini av skúlanum. Heilsuskúlin verður ikki longur partur av Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, men sjálvstøðugur skúli. Broytingin er neyðug, tí at Sjúkrarøktarfrøðiskúlin verður lagdur undir Setrið, og Heilsuskúlin er ein yrkisútbúgving. Tørvurin á starvsfólki økist, sum broytingar hava verið gjøgnum árini. Í dag starvast 11 starvsfólk á Heilsuskúlanum.

Eitt ávist skeiðsvirksemi hevur verið og er á Heilsuskúlanum. Í 2012 varð skipað fyri skeiðið í Cooperative learning, samskipaðari læring, og undirtøkan var stór, bæði frá miðnámsskúlum og føroyska fólkaskúlanum. Førleikamennandi skeið innan medisin, hava somuleiðis verið hildin. Tað verður á hvørjum ári skipað fyri vegleiðaraskeiðum, fyri starvsvenjingarpláss hjá næmingunum.

Heilsurøktarar fingu í 2014 møguleika at søkja autorisatión eins og í Danmark. Heilsuskúlin vendir javnan eyguni úteftir fyri at fylgja við í broytingum í útbúgvingunum

aðrastaðni. Tillagingar verða gjørdar so hvørt, tað er neyðugt, fyri at hava nýggjastu vitan, besta fakliga førleikan og møguleikan at søkja víðari útbúgving. Heilsuskúlin hevur enn í dag tætt samstarv við danskar skúlar um innihaldið í útbúgvingunum fyri at tryggja støðið í útbúgvingunum.

## Hví útbúgving?

Áhugavert er at hugleiða um tørvin á útbúgving innan røkt og sjúkrarøkt, og av og á eru spurningar settir, um tað er neyðugt við útbúgving til hesi starvsfólk, ið áttu at dugað vanligar húsligar uppgávur og røkt ígjøgnum lívsroyndir við egnum børnum og húsarhaldi.

Uppgávurnar hjá heilsuhjálparum í dag eru av slíkum slagi, ið ein og hvør við vanligum lívsroyndum innan húsligt arbeiði ikki kann taka sær av. Uppgávurnar umfata millum annað at "eygleiða" broytingar hjá borgarum sum sera týðandi part av at fyribyrgja sjúku og mistar førleikar í samstarvinum við aðrar fakbólkar á økinum.

Slíkar eygleiðingar, ið er undirbygdar av einari grundleggjandi vitan, kunnu við smáum tiltøkum fyribyrgja longri innleggingar og varandi førleikamiss. At duga at síggja týdningin av at boða frá, tá ein borgari er svimbul, manglar vætu, ella tá ein borgari er við at fáa sár av at sita ov nógv í somu støðu. Ella tá innrættingin í heiminum við leidningum og leysum teppum ger, at vandi er fyri at detta og bróta seg sundur, og tað kann føra við sær, at borgarin blívur tungur røktarkrevjadi sjúklingur restina av lívinum.  Slíkar eygleiðingar eru ikki sjálvsagdur førleiki, men krevja upplæring.

Útbúgving tryggjar, at arbeiðið verður framt við einsrættaðum fakligum støði soleiðis, at borgarar fáa somu veitingar uttan mun til, hvør starvsfólkið er, ið veitir uppgávuna. Útbúgving av starvsfólki tryggjar bestu arbeiðsumstøður og fyribyrgir skaðar og óneyðugt slit í arbeiðinum, bæði kropsliga og sálarliga. Útbúgving brynjar starvsfólkini til at vera um onnur menniskju á ein virðiligan hátt.

Við útbúgving av umleið 60 fakfólkum árliga síðani 2001 er almanna og heilsuøkið ment og styrkt nógv fakliga tey 15 árini, ið heilsuútbúgvingarnar hava verið í Føroyum. Tað eru higartil 560 heilsuhjálparar og 165 heilsurøktarar útbúnir á Heilsuskúlanum.

Ikki kann sigast annað enn, at føroyskar kvinnur í 1974 hava verið framskygdar og sera vísar, tá tær hava kravt at fáa útbúgving innan sítt arbeiðsøki.

# Danskt á miðnámi átti at fingið hægri raðfesting

Dorthe Pedersen og Kinna Poulsen

Við nýggju miðnámsskúlaskipanini, sum varð innførd í 2013, upplivdu vit ta sannroynd, at danskt bert er kravd lærugrein á almennu leiðini og málleiðini innan hugbreytina. Hetta hevur havt við sær, at lærugreinin frá at vera ein stór lærugrein á gymnasialum miðnámi við nógvum lærarum er minkað burtur – men ikki í einki, tí tað vísir seg, at tey, sum hava og velja danskt, eru sera áhugað í lærugreinini, og harumframt uppliva dansklærarar ein øktan áhuga fyri lærugreinini eitt nú í sambandi við breytaruppgávur í 2.s og breytarverkætlanir í 3.s. Men hetta er væl at merkja bert galdandi fyri teir lutfalsliga fáu næmingar, sum antin hava danskt á almennu leið ella málleið ella velja danskt frá 2.s (hetta er á hugbreyt og náttúrubreyt). Í einari innanhýsis kanning (á Glasi í Hoydølum) í tveimum danskflokkum (einum á almennu leið og einum valholdi) vórðu næmingarnir spurdir um hetta:

1. Hví valdi tú danskt? (verður bert svarað, um næmingurin hevur danskt sum vallærugrein)
2. Hvussu dámar tær lærugreinina danskt?
3. Í hvønn mun metir tú, at tú kanst brúka vitan frá lærugreinini?
4. Í hvønn mun metir tú, at lærugreinin hóskar væl saman við hinum lærugreinunum?
5. Er danskt ein neyðug lærugrein, heldur tú?

Eftir svarunum at døma eru næmingarnir sera jaligir mótvegis lærugreinini. Til spurningin, hvørt teimum dámar lærugreinina, svara tey flestu antin sera væl ella væl. Um orsøkina til at velja lærugreinina svara tey flestu frá valholdinum, at tey vilja førleikamenna seg í mun til víðari lesnað í Danmark. Sum heild halda næmingarnir, at lærugreinin er viðkomandi, og at hon hóskar saman við øðrum lærugreinum.

Í nógvum Norðurlondum læra tey mál, sum gera tey før fyri at samskifta lætt og neyvt í norðurlendskum høpi, t.e. at lærugreinir í skandinaviskum málum eru kravdar í miðnámsskúlunum í nógvum Norðurlondum (finnar hava svenskt og grønlendingar danskt). Tað tykist margháttligt, at vit velja eina heilt aðra kós at avmarka okkum til enskt. Longu nú eru vit varug við, at næmingarnir hava ilt við at brúka danskt sum amboðslærugrein, og hetta er ein trupulleiki, sum gongur út yvir abstraktiónsstigið í allari skúlaskipanini, av tí at nógv tilfar, sum verður brúkt, er á donskum. Loysnin hjá Mentamálaráðnum tykist vera at týða tilfar. Hetta er sjálvandi at fegnast um, men av tí at

landið er lítið, so verður hetta tilfar ikki nóg fjølbroytt, óansæð hvussu nógv vit týða. Eisini er tað ein vansi, um meginparturin av skúlatilfarinum er skrivaður úr øðrum sjónarmiði enn føroyskum.

Tá vit dansklærarar á miðnámi í 2011 hoyrdu um ætlanir Mentamálaráðsins at skerja danskt, orðaðu vit eitt bræv til mentanarnevnd Løgtingsins, har vit mæltu frá hesum, samstundis sum vit fegnaðust um avtaluna við danska kenslumálaráðið, ið loksins viðurkendi føroyskt sum førleikagevandi móðurmálslærugrein á jøvnum føti við móðurmálslærugreinir í øðrum Norðurlondum. Hetta var ein neyðug viðurkenning av okkara máli, men í okkara optikki er eingin orsøk til at minka um danskt sum lærugrein. Aðrar røddir enn okkara hava verið frammi um hetta sama. Eitt nú fýltist Herálvur Jacobsen, formaður Føroya Lærarafelags, í grein í Skúlablaðnum herfyri á, at danskt verður lægri raðfest enn hinar lærugreinirnar, serliga tá hugsað verður um, at meginparturin av okkara ungu fara til Danmarkar at lesa. Eisini millum føroysklærarar uppliva vit eina ørkymlan um, at danskt ikki longur er kravd lærugrein. Undir gomlu miðnámsskúlaskipanini samstarvaðu føroysklærarar og dansklærarar rættiliga nógv. Við broyttu skipanini ber bara til í fáum førum at samstarva millum lærugreinarnar. Samstarvið er annars gevandi við tað, at lærugreinarnar supplera hvørja aðra so væl. Ofta er talan um tvørfakligt samstarv, eitt nú í einum tíðarráki (t.d. nýbrotinum/det moderne gennembrud). Hetta samstarvið gevur bæði lærarum og næmingum eina kenslu av, at evnið verður viðgjørt væl og virðiliga, og næmingarnir verða eisini í størri mun varugir við sambandið millum lærugreinarnar og fáa eina størri fatan av mentanarsøguliga arvinum úr Europa og Norðurlondum sum heild.

Danskt gevur næmingunum førleikar at samskifta bæði í skrift og talu í øllum Norðurlondum, gevur teimum lætta atgongd til norðurlendsku mentanirnar og er ein sera týdningarmikil málsligur førleiki hjá teimum mongu næmingunum (uml. 80-90%), sum velja at lesa í Danmark. Í viðgerðini av málinum higartil hevur mest verið víst til universitetsútbúgvingar, men ein stórur partur av næmingunum tekur professiónsútbúgvingar, og eisini har er førleikin í donskum týdningarmikil. Harumframt er danskt tað eina almenna málið í Føroyum.

Umframt málsliga partin miðsavnar danskundirvísingin seg um bókmenta-, lista- og mentanarsøgu, ið er neyðug fyri at geva næmingunum innlit í europisk hugsjónarlig rák. Við tað at danskt er eitt av teimum stóru norðurlendsku málunum, og av tí at lærugreinin fevnir um bæði svenskt og norskt, veitir lærugreinin trygd fyri stórum bókmentaligum fjølbroytni og gevur somuleiðis næmingunum møguleika at lesa dygdargóðar tekstir innan fleiri sjangrur og tíðarskeið á upprunamálinum. Sostatt hava vit dansklærarar treysti og vón um, at eisini okkara myndugleikar fara at skilja vandan í at minka um danskt á miðnámi.

# Námsfrøðiliga útbúgvingin skal vera í Føroyum - viðtal við Jón í Haraldsstovu

Tórður Johannesarson

**Jón í Haraldsstovu, ið er MA í søgu og samfelagsfrøði, hevur tikið bæði ástøðiliga og verkliga partin av námsfrøðiligu útbúgvingini fyri miðnámslærarar í Føroyum. Hetta er fyrstu ferð síðan 1997, at lærari, sum ikki undirvísir í føroyskum, tekur alla útbúgvingina í Føroyum. Jón tók ástøðiliga partin í 2012. Á heysti 2016 tók hann verkliga partin á Miðnámi á Kambsdali.**

### 1. Hví mundi tað taka so drúgva tíð at fáa verkliga partin?

Tí at møguleiki var ikki at taka verkliga partin í Føroyum, og ikki var gjørligt at fara av landinum í 10 vikur. Av prinsipiellum orsøkum helt eg eisini, at tað var skeivt, at eg skuldi taka verkliga partin í Danmark, har eg skuldi undirvísa á einum øðrum máli enn mínum móðurmáli. Tað kann ikki vera annað enn ein løgin støða.

### 2. Hví valdi tú at taka verkliga partin av námsfrøði á Miðnámi á Kambsdali og ikki í Danmark?

Eg var fegin um tilboðið at fara á Kambsdal. Eg kundi samskifta við bæði næmingar og vegleiðarar á mínum máli og undirvísa næmingum, sum eru í okkara undirvísingarskipan.

### 3. Hvat heldur tú um, at tað gingu so nógv ár til, at tú slapp at taka verkliga partin?

Eg fekk í 2014 tilboð um at fara til Danmarkar at taka verkliga partin, men valdi ikki at taka av tilboðnum (sí omanfyri). At tað er so stórt glopp ímillum ástøðiliga og verkliga partin er spell, tí tað hevði heilt víst givið betri meining og meira samanhang millum tað ástøðiliga og tað verkliga, um lærarar beinanvegin kundu tikið verkliga partin beint eftir tann ástøðiliga.

### 4. Hvørjar fyrimunir og vansar sært tú í at taka verkliga partin í Føroyum?

Sum nevnt, samskifti og undirvísing, og samskifti við vegleiðarar og mentanin ger tað eisini meir viðkomandi enn eg kann ímynda mær, at tað ger í Danmark. Fleiri, eg havi tosað við, ið hava verið uttanlands, saknaðu at kunna brúka móðurmálið.

### 5. Hvat fekst tú burturúr?

Tað var ein sera góð og gevandi tíð, sum eg hevði á Kambsdali. Vegleiðararnir vóru dugnaligir, og eg fekk sera nógv burturúr bæði fakliga og námsfrøðiliga. Eg kendi tveir teirra frammanundan, men helt ongantíð, at tað var ein trupulleiki. Í gongdini høvdu teir kritikk og ráð, sum eg fekk nógv burturúr, og sum eg tann dag í dag hugsi um, tá ið eg fyrireiki meg til undirvísing.

### 6. Hvussu heldur tú, at námsfrøðiliga útbúgvingin á miðnámi átti at verið skipað í framtíðini?

Á Læraraskúlanum eru kreftir, sum hvønn einasta dag undirvísa í námsfrøði, og frá Læraraskúlanum (Fróðskaparsetrinum) koma hvørt einasta ár bæði lærarar og námsfrøðingar, so eg skilji ikki, at hesir førleikar ikki vera brúktir til at undirvísa miðnámsskúlalærarum í ástøðiliga partinum; tað átti at verið ein sjálvfylgja. Um ástøðiligi parturin var í Føroyum, kundi tað verið skipað gjøgnum eitt heilt skúlaár, so so at ein dagur um vikuna fór til undirvísing í ástøðiliga partinum, í staðin fyri, at tað verður trýst saman til drúgv vikuskiftisskeið. So eg haldi, at vit púra vist áttu at havt bæði ástøðiliga og verkliga partin í Føroyum.

*Politiken* 28.08.2010, leyslig týðing eftir Tórð Johannesarson.

# Vit fóru skeiv – hví terping og uttanatlæra kortini hevur týdning

**Vit gjørdu eitt stórt mistak, tá ið vit stríddust móti Svarta Skúlanum, sigur Sten Clod Poulsen.**

Sten Clod Poulsen, cand.psych., hevur granskað á *Danmarks Pædagogiske Institut* í Keypmannahavn. Seinnu árini hevur hann verið námsfrøðiligur ráðgevi. Hann hevur skrivað bókina *Tilegnelse af boglige fagkundskaber*.

Fyri góðum 30 árum síðan, tað er síðst í sjeytiárunum, byrjaðu hann og tveir aðrir námsfrøðiligir granskarar eina kollveltandi verkætlan, sum snúði seg um at skriva fyrstu stóru handbókina í tvørfakligum og evnislagaðum verkætlanararbeiði í fólkaskúlanum.[4] Bókin kom út, bleiv útseld, endurskoðað og givin út aftur. Hon bleiv eisini týdd til svenskt og norskt. Seinni er hon stytt og givin út á nýggjum forlagi í Danmark.

Teir góvu aðrar líknandi bøkur út, sum vóru sera væl móttiknar. Nú 30 ár seinni er verkætlanarnámsfrøði næstan vorðin kravd í donsku útbúgvingarskipanini, serliga í fólkaskúlanum.

Teir mentu verkætlanarnámsfrøðina sum ein mótleik til tátíðarskúlan. Nú skuldi kunnskapur ikki longu terpast, hann skuldi brúkast til nakað. Hann skuldi brúkast til at fáa vitan um "veruleikan" uttan fyri skúlan. Úrslitini skuldu, segði hann, brúkast til eina kollvelting! Ella í øllum førum til eina kollvelting av allari undirvísingarskipanini.

Verkætlanarnámsfrøðin bleiv eisini skapt sum mótsetningur til ein skúla, har aðaltankin var, at einstøku lærugreinirnar vóru í hásæti, og har læringin hjá næmingunum bleiv tryggjað gjøgnum skipaðar uppgávuloysnir, krevjandi skúlating, stranga yvirhoyring og royndir við ongum hjálparamboðum.

Í blaðgreinini úttalar Sten C. Poulsen seg ikki sum granskari, men sum námsfrøðiligur ráðgevi. Hann dugir at síggja tær vanlukkuligu avleiðingarnar, sum tann einstáttaði og hálovandi hugburðurin av tvørfakligheit og verkætlanararbeiði hevur gjørt: Lærarar nú á døgum vita ikki, hvussu næmingar og skeiðsluttakarar kunnu ogna sær grundleggjandi vitan. Snøgt sagt, teir hava fortrongt týdningin av tí at minnast í sambandi við læring. Sum

[4] PBL er vanlig stytting á eingilskum fyri *problem based learning*, men summir mæla heldur til at kalla tað EBL, sum stendur fyri *enquiry based learning*, tí tað er ikki vist, at hetta slagið av læring altíð skal vera grundað á eitt problem; tað kann eisini vera forvitni.

Sten C. Poulsen tekur til, “Vit hava knúst tann svarta skúlan[5] og ført barnið út í óføri, og samstundis fegnast vit – tað er ein vanlukka!”

Hetta er farið út av leið, tí at teir, sum komu við verkætlanarnámsfrøðini, høvdu gingið í einum skúla, har teir høvdu fingið grundleggjandi vitan. Hesa vitan tóku teir fyri givið, tí at teir høvdu gingið í einum slíkum skúla – einum sokallaðum ”svørtum skúla”.

Men uppgerðin við tann hataða skúlan, sum bygdi á dygga vitan við uttanatlæru, vóru so væleydnaðar, at tann grundleggjandi vitanin, sum undanfarna ættarliðið hevði, er fullkomiliga útruddað. Tað merkir, at tann tvørfakligheit og evnislaging (problemorientering) og tað verkætlanararbeiði, sum børn og ung uppliva nú á døgum, hvíla á  einum sera veikum og vantandi fakligum grundarlagi, sum eru tilvildarligar upplýsingar frá internetinum.

Men uttan tryggar, neyvar og viðkomandi einkultfakligar kunnleikar er eingin tvørfakligheit og problembasering gjørlig. Uttan problembaseraðar greiningar eru verkætlanir bert dagdvølja hjá næmingum, sum ikki longur megna at savna seg, og sum ikki duga at gera sær sjálvstøðugt innlit.

Miðnámið, sum Sten C. Poulsen gekk í í 1958, hevði sum aðalmál, at næmingarnir høvdu grundleggjandi vitan. Talan var um eitt miðnám, har tað at minnast var eitt aðalmál. At gera skúlating merkti at ogna sær fakliga innihaldið í bókunum, og lærarin kannaði, um næmingurin skilti innihaldið. Hetta gjørdi hann við at hava royndir.

Tá var eingin tvørfakligheit og heldur ongar verkætlanir. Men í fleiri av lærugreinunum bleiv vantandi vitan avdúkað, og lærarin gjørdi næmingunum greitt, at hetta mátti fáast upp á pláss.

Sten C. Poulsen sigur, at var eitt stórt mistak í nútímans danskari skúlaundirvísing at seta tað at minnast uttanat og tað at fata upp sum mótsetningar.

Læring gjøgnum uttanatlæru er í Danmark brennimerkt sum ”tann svarti skúlin” og er skírd sum afturhaldssinnað námsfrøðilig kúgan av næmingum, skeiðsluttakarum og lesandi.

Læring gjøgnum tað at skilja sjálvvirkni (selvaktivitet) er lyklaorðið í fólkaskúlanum, gymnasiureforminum og hjá teimum lesandi. Hetta er sambært Sten C. Poulsen ein stór misskiljing. Grundleggjandi einkultfakligir kunnskapir eru ikki í andsøgn við sjálvstøðugt innlit; hesir eru ein treyt fyri sjálvstøðugum innliti. Herfyri undirvísti Sten C. Poulsen á VUC (voksenundervisningscenter) og tosaði við ein bólk av kvinnuligum tilflytarum.

---

[5] Tann svarti skúlin er eitt hugtak um ein skúla, sum byggir á uttanatlæru, ramsur, sum verða vandar við einum strongum og autoriterum lærara.

”Okkara lærari hevur sagt, at vit ikki skulu brúka okkara minni”, segði ein ung, eldhugað turkisk kvinna. “Hví stendur tú og sigur, at minnið er týdningarmikið fyri læring í skúlanum?”

Sambært Sten C. Poulsen er hetta tekin um, at lærarar eru farnir av kós. Næmingar og lesandi skulu meta minnið og tað at skilja líka høgt, tí annars fáa tey ongantíð haldgóðar nútímans fakkunnleikar, sum kunnu brúkast til sjálvstøðuga hugsan.

Mistøkini hjá lærarunum eru útbreidd í donsku útbúgvingarskipanini. Samfelagsliga avleiðingin er, at næmingar og lesandi nema sær svikaligan og grunnan kunnleika.

Og teirra vitan er samstundis avmarkað. Teir kunnu gjøgnum internetið staðfesta vitan, men kunnu ikki meta um góðskuna av teirri mongd av vitan uttan sjálvir at hava dyggan fakkunnleika. Tað kann enda við, at teir halda, at holocaust er lygn og uppfunnið, tí teir á onkrari heimasíðu hava funnið hesar upplýsingar og brúka heimasíðuna sum prógv.

Børn og ung, sum koma úr heimum, har foreldrini hava útbúgving, kunnu í vissan mun klára seg, tí at foreldrini hava eina fakliga grundvitan. Børn og ung, ið koma úr heimum við ongari útbúgving, kunnu í góðari trúgv halda, at skúlating eru líkamikið, og at tað ber til at tosa og skriva seg gjøgnum skúlan uttan at hava ognað sær sjálvstøðugan kunnleika, tí at tað leggur nógv av nútíðar undirvísing upp til.

Hann vísir á, at asiatisk lond hava stóran áhuga í danskari námsfrøði – tvørfakligheit, verkætlanararbeiði og stórum sjálvstøðugum uppgávum. Men í Asia hava tey frammanundan eina sterka siðvenju at ogna sær vitan við uttanatlæru. Nú fáa tey bæði – bæði fakkunnleikan og sjálvstøðuga kritiska problemgreining. Í Danmark er í løtuni bara tann eina - takkonstruktiónin uttan grundvøll. At tað er komið so langt, tekur Sten C. Poulsen meðábyrgd av. Hann biður um umbering.